# Nýggj miðstøð fyri ferðavinnu í Vestmanna

**Vestmenningar bróta upp úr nýggjum innan ferðavinnuna og byggja nú fyrstu miðstøðina av sínum slagi í Føroyum**

FERÐAVINNA
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*



*Nýggja ferðavinnumiðstøðin kemur at liggja væl fyri Inni á Fjørð í Vestmanna, beint við staðið har bátarnir sigla undir Vestmannabjørgini*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Gongst sum ætlað fer eitt nýtt turistsentur at standa klárt í Vestmanna um slakar tríggjar mánaðir.

Nú er longu nakað síðani, at partafelagið Vestmanna Tourist Center og Vestmanna Timburhandil skivaðu undir sáttmála um bygging av hesari miðstøðini. Bygningurin, sum stendur á havnalagnum inni á Fjørð skal standa liðugur 1. apríl og skal takast alment í nýtslu 1. mai.

– Vit hava verið nakað tarnaðir av veðri, men vit vænta kortini at tíðarætlanin fer at halda, sigur stjórin á sentrinum, Louis Kristensen Sosialin

Hann dylir ikki fyri, at hann er sera spentur uppá henda bygningin. Orsøkin til hetta er, at hetta er fyrsti bygningur av siínum slagi í Føroyum.

### Strømm tíðarætlan

Samlaða víddin av bygninginum er umleið 230 fermetrar, harav matstovan er 70 fermetrar. Sitipláss eru til eini 70 fólk.

Ætlanin er at hava matstovu, kunningarstovu og sølubúð á 1. hædd. Henda hæddin skal gerast fyrst liðug, áðrenn farið verður undir 2. hædd.

– Orsakað av teirri strammu tíðarætlanini verður henda hæddin tó ikki liðug fyrrenn komandi summar, sigur Louis Kristensen.

Stjórin í Vestmanna Timburhandli, Óli Hansen sigur, at víst er tíðarætlanin knøpp, men hon fer kortini at halda.

T eir smíða elementini til bygningin inni í høllini í Timburhandlinum, samstundis sum betongarbeiðið verður gjørt uttandura.

### Góð plasering

Hetta er sum nevnt fyrsti bygningurin av slíkum slagi í Føroyum, og tí verður við spenningi sæð fram til dagin, tá virksemið byrjar í summar.

Tá virksemið er komið í hæddina fara væntandi eini 5 fólk at arbeiða har um summarið. Søkt er eisini um skeinkiloyvi.

Bygningurin verður sum nevnt bygdur inni á Fjørð í Vestmanna. Hetta er ein góð plasering, tí hann liggur bert eitt hanagleiv frá staðnum, har bátarnir fara undir Vestmannabjørgini.

## Stórt sangtiltak í Klaksvík

Undir yvirskriftini "Norðoyingar. Komið og syngið við" verður KÍ-høllini karmur um eitt spennandi sangtiltak leygarkvøldið.

Tað eru tey ungu í samkomuni Betesda, sum hetta leygarkvøldið kl. 21 bjóða øllum til eina fjølbroytta skrá við størsta dentinum á sang, sjálvandi.

Fyrireikararnir, ið nevna seg "Yngra Kvartettin í Betesda" ætla at skapa ein hugnaligan stemning hetta kvøldið. Á skránni er tískil felagssangur, upplestur, leikur, tala – og sjálvandi fer eisini henda Yngra Kvartettin at luttaka við sangi sínum.

Aftaná verður boðið til ein drekkamunn við onkrum góðum afturvið.

**sb.**

## Lesiringar eru ikki yt

**Fuglfirðingar bróta upp úr nýggjum við spennandi tiltaki í kvøld**

Tað vóru kanska tey sum hildu at lesiringar vóru yt. Men tað halda tey í hvussu so er ikki í Fuglafirði. Í kvøld verður nevniliga farið undir ein slíkan lesiring.

Í vetur fer bókasavnið í Fuglafirði at stovna ein lesibólk. Í hesum bólkinum fáa luttakararnir høvi til at tosa við onnur um tað, sum tey hava lisið. Ella sum tey siga tað - frá einum lesara til ein annan lesara.

Í fyrstu syftu ætlar lesiringurin í Fuglafirði sær at lesa føroyskar bøkur ella bøkur sum eru týddar til føroyskt. Lesiringurin kemur so saman eina ferð um mánaðin at tosa um bøkurnar, tey hava lisið.

Ætlanin er at møtast fyrstu ferð í gjárkvøldið kl. 20 í Fuglafjarðar Bókasavni. Fyrsta bókin, tey fara at lesa er bókin "Sebastians Hús" eftir Oddvør Johansen.

**sb.**

KAUPTHING
Virðisbrævameklarafelag



Vika 2, 2005
www.kaupthing.fo

# Ógreið arbeiðsmarknaðarfrágreiðing

MARKNAÐARRÁK

Farna vika var merkt av, at amerikanska arbeiðsmarknaðarfrágreiðingin fyri desembur kom fríggjadagin. Ídnaðarálitistølini úr USA og Evropa vóru sum væntað hampuliga jalig, meðan prísvøksturin í Evropa gjørdist 2,3%, sum var eitt sindur hægri enn væntað. Á fíggjarmarknaðunum var vikan soleiðis rættiliga friðarlig, meðan allir íleggjararnir bíðaðu eftir teimum fyrstu týdningarmiklu lyklatølunum í nýggja árinum.

Fyri fyrstu ferð í langa tíð hevði amerikanska arbeiðsmarknaðarfrágreiðing in snøgt sagt onga ávirkan á fíggjarmarknaðirnar! Tað er ikki tí, íleggjarar halda hana vera minni týdningarmikla nú, ei heldur gjørdist hon heilt sum væntað. Men tey ymsu lyklatølini í frágreiðingini peikaðu hvørt sín veg. Talið á nýggjum størvum uttan fyri landbúnaðin, sum hevur verið týdningarmesta lyklatalið í fleiri ár, gjørdist 157.000, imóti væntaðum 175.000. Tó varð talið fyri novembur samstundis uppmett við 25.000. Íleggjarar løgdu eisini stóran dent á, at lønirnar í desembur vóru 2,7% hægri enn í desembur 2003. Har var væntað 2,4%. Orsøkin til, at lønarvøksturin hevur so stóran týdning nú er, at tað fyrr í vikuni varð avdúkað, at limir í nevndini í amerikanska tjóðbankanum, FED, eru farnir at óttast vandan fyri stórum prísvøkstri. Tessvegna økir hægri lønarvøkstur um sannlíkindini fyri komandi rentuhækkingum.

Við hesum prísvakstraróttanum í huga verður áhugavert at síggja vøksturin í amerikansku framleiðsluprísunum, sum verður kunngjørdur fríggjadagin. Brúkara- og framleiðsluprísirnir hava samsveiggjað søguliga, og tøl fyri hálvvirkaðar vørur benda á, at framleiðsluprísirnir kunnu hækka. Hesa vikuna koma úr USA eisini tøl fyri smásøluna og handilsjavnan. Í Evropa koma BTÚ-tøl og týska vinnuálitistalið ZEW.

Orsakað av hækkaðum dollara eru tey evropisku partabrøvini, og serliga tey norðurlendsku, hækkaði fyrstu vikuna av árinum meðan tey amerikansku eru lækkaði. Arbeiðsmarknaðarfrágreiðingin ávirkaði ikki partabrøvini.

Fleiri fyritøkur, eitt nú Yahoo!, Intel og Apple, kunngerða roknskap hesa vikuna og kunnu hesir væntast at fáa ávirkan á partabrævagongdina hesa vikuna.

Rentur

| | Renta | +/- %-stig |
|---|---|---|
| Diskonto | 2,00% | 0,00% |
| 2 ára lánsbræv | 2,50% | -0,02% |
| 5 ára lánsbræv | 3,06% | -0,03% |
| 10 ára lánsbræv | 3,80% | -0,01% |

Partabrævavísitøl

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| KFX, Danmark | 290,5 | 0,3% |
| OMX, Svøríki | 752,8 | 0,7% |
| Eurostoxx 50, Evropa | 2.979,0 | 0,3% |
| S&P 500, USA | 1.186,2 | -2,1% |

Íløgufeløg

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 106,74 | 0,3% |
| Evru Lánsbrøv | 171,47 | 0,1% |
| Norrøn Partabrøv | 87,21 | 0,3% |
| Altjóða Vøkstur | 59,77 | 0,6% |

Gjaldoyru

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| USD | 5,68 | 2,8% |
| EUR | 7,44 | 0,1% |
| GBP | 10,65 | 1,2% |
| NOK | 0,90 | 0,1% |

*Renta og kursir kl. 10 í gjár. Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan.*